RUNAVÍKAR KOMMUNA

## Sosialráðgevi til Eysturoyar barnaverndartænastu

**Eitt farloyvisstarv, ¾ tíð, sum sosialráðgevi í Eysturoyar barnaverndartænastu er leyst at søkja til setan frá 01.08.2010 til 31.03.2011.**

**Um Eysturoyar barnaverndartænastu**
Eysturoyar barnaverndartænasta fevnir um Nes, Sjóvar og Runavíkar kommunu. Uppgávan hjá barnaverndartænastuni er at tryggja børnum, ið liva undir viðurskiftum ið kunnu skaða teirra heilsu og menning, neyðuga hjálp og umsorgan.

Umsitingarliga er Eysturoyar barnaverndartænasta eind undir Sosialu deild í Runavíkar kommunu.

**Starvið**
Tú kemur, í tøttum samstarvi við sosialdeildarleiðaran og hin sosialráðgeva á deildini, at taka tær av einum spennandi og fjøltáttaðum øki við málsviðgerð, ráðgeving og øðrum uppgávum sum barnaverndarumsitingin tekur sær av.

**Arbeiðsuppgávan umfatar m.a.:**
- at fyrireika mál til nevndarviðgerð
- at ráðgeva og vegleiða barna- og ungdómsfamiljum við serligum tørvi
- at ráðgeva barnaverndini í barnaforsorgarlógini
- at seta í verk og fylgja upp fyriskipanir
- at virka sum samskipari í málum har fleiri myndugleikar eru við
- at samstarva tvørfakligt
- at arbeiða fyribyrgjandi í samstarvi við fakpersónar og stovnar á barna- og ungdómsøkinum

**Vit leita eftir starvsfelaga, ið:**
- er útbúgvin sosialráðgevi ella hevur aðra viðkomandi miðallanga útbúgving
- hevur royndir sum málsviðgeri ella aðrar viðkomandi royndir
- hevur áhuga og evnir at arbeiða við barna og ungdómsfamiljum við serligum tørvi
- megnar at vera nágreiniligur og samstundis hava nógvar bóltar í luftini
- hevur gott yvirlit og dugir væl at orða seg

**Vit bjóða tær**
Eitt spennandi farloyvisstarvstarv við nógvum avbjóðingum og við góðum møgulleika fyri førleikamenning.

**Setanarviðurskifti**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya og Starvsmannafelagið ella annað viðkomandi fakfelag.

**Fleiri upplýsingar**
Fáast við at venda sær til Jákup H. Foldbo, sosialdeildarleiðara ella Jenny Petersen, sosialráðgeva á telefon 417000.

**Søk starvið**
Við at senda okkum eina umsókn í seinasta lagi 29.06.2010 kl. 12:00

Runavíkar Kommuna
att. Eysturoyar barnaverndartænasta
Heiðavegur 26
Postboks 139
FO-600 Saltangará

**Runavíkar Kommuna**
Heiðavegur 26 · Postrúm 139
FO-610 Saltangará

Eysturkommuna

## LEIÐARI TIL GJÁA Í GØTU

Søkt verður eftir leiðara til dagstovnin Gjáa í Gøtu at byrja 01. august 2010.

Leiðarin hevur ábyrgdina av tí aðalmáli, ið er sett fyri stovnin og av tí námsfrøðiliga virkseminum, ið verður gjørt.

Leiðarin hevur, í samstarv við Eysturkommunu, tað fíggjarligu og fyrisitingarligu ábyrgdina.

Ynskiligt er, at umsøkjarin hevur leiðsluroyndir.

Starvið er 40 tímar um vikuna.

Í Gjáa arbeiða 8 námsfrøðingar og 12 hjálparfólk.

**Um stovnin:**
Dagstovnurin Gjái lat upp 1. februar 2000 og er ásettur til 70 børn. Í dag eru 3 barnagarðsstovur og 1 smábarnastova, men eftir summarfrítíðina verða 3 barnagarðsstovur. Stovnurin liggur í barnavinarligum umhvørvi við Gøtugjógv.

**Førleikakrøv:**

- Námsfrøðiliga útbúgving.

**Vit ynskja av tær:**
- at tú ert álítandi og hevur góð samstarvsevnir
- at tú hevur hug og áræði at skapa ein fjølbroyttan og tryggan gerandisdag
- at tú vilt vera við til at mynda og menna tað námsfrøðiliga umhvørvið

**Í dagliga arbeiðinum leggja vit m. a. dent á:**
- at børn og starvsfólk trívast og fáa avbjóðingar í gerandisdegnum
- at hava gott samstarv við foreldur og starvsfólk
- at skapa álit og tryggleika, bæði fyri foreldur og børn
- at virða tað einstaka barnið
- at ferðast nógv í náttúruni

**Lønar- og setanartreytir**
Starvið verður lønt sambært avtalu millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðagevarafelagið.

**Umsóknir**
Umsóknir við avriti av prógvi og møguligum viðmælum skulu vera Eysturkommunu, Postboks 30, 510 Gøta í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 23. juni 2010.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Ove Heinesen, umsitingarleiðara, á telefon 73 00 12.

TVØROYRAR KOMMUNA

## Reingerðarfólk

Tvøroyrar kommuna søkir eftir tveimum reingerðarfólkum.

Sí meira á www.tvoroyri.fo



Buell XBSX City
Urban streetfighter
25 års specialedition

Den sejeste racer i Harley Davidson familien

Demomodel 2.500 km, årg. 2008.

Farve: Kick ash translucid dark blue = gennemsigtige covers. Aluminum stel og sorte fælge. Har med sin korte aksel afstand nogle fantastiske køreregenskaber.

Med 1000 ccm Thunderstorm® motor.

Tilbud SPAR 50% NU: Kr 79.900,-

Mere info på Tel 210405 eller www.HD.fo

Riders

## Trolbátur til sølu



Við hesum verður trolbáturin Sigrun lýstur til sølu. BRT 158,90 og NRT 47,60. L. 22,230 m, B. 6,800 m og D 4,140 m. Trolbáturin er bygdur í 1984 í Fraklandi. Motorur mrk. Mitsubishi.

Hann hevur fiskiloyvi í bólki 4T og hevur í fiskiárinum 2009/2010 fingið tillutað 120,57 fiskidagar.

Selt verður um nøktandi boð fæst. Áhugað kunna venda sær til Inga Højgaard, advokat, ih@lawfirm.fo. Trolbáturin kann síggjast eftir nærri avtalu.

ADVOKATFELAGIÐ VIÐ STROND 4
YVIRI VIÐ STROND 4 · TEL 311260 · FAX 311261 · P.O. BOX 359
FO-110 TÓRSHAVN · FAROE ISLANDS
EMAIL: LAWFIRM@LAWFIRM.FO
**HEIMASÍÐA: WWW.LAWFIRM.FO**

JÓGVAN PÁLL LASSEN · PETUR EVEN DJURHUUS
JÓGVAN E. ELLEFSEN · ANNA DAM · INGI HØJGAARD
GUNN ELLEFSEN · MIMI STEINTÓRSDÓTTIR